## Jens Lisberg við nýggjari fløgu

Nýggj fløga við Jens Lisberg er útkomin, og verður nú at fáa í handlum kring landið. Jens Lisberg (f.1950) er millum fólkakærastu sangarar í landinum. Sum forsangari í Tvørábólkinum Sputnik, var hann í mong ár afturvendandi at hoyra í Kvøðuljómasendingunum hjá útvarpinum. Eftir drúgvan steðg roynir hann seg nú á egnum beinum. Seks sangir eigur hann sjálvur, fimm eru kendir útlendskir og hin eini er nýggjur fosturlandssangur.



## Vatnflóð í Roskilde

Roskilde Festivalurin hevur fingið eina ringa byrjan. Tað hevur regnað nógv í Danmark seinastu dagarnir, og hetta førir nú við sær, at perkeringsplássini á kenda festivalinum standu undir í vatni. Leiðslan á festivalinum mælir nú øllum luttakarum at taka bil við á økið, tí danskir veðurmenn siga frá nógvum regni heilt fram til leygardagin.

# Høgni setti lív í vátu festivalgestirnar

**Rættiliga nógv fólk var komið saman at hoyra Høgna Lisberg, tá hann fór á pall á Roskilde Festivalinum í gjárkvøldið, og tey sluppu at uppliva Høgna og bólkin veruliga fáa lív í fjøldina.**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Allastaðni eru stór runudýki, Roskilde Festivalurin er hart raktur av ringa veðrinum í Danmark.*
*Mynd: Niels Uni Dam*



*Høgni Lisberg var væl upplagdur og fekk veruligt lív í vátu festival gestirnar.*

Roskilde Festivalurin er eitt risastórt runudýki, allastaðni eru stórir hylar og tey, ið ikki eru í stivlum ella regnklæðum eru at kroppi. Sambært DMI verður veðrið tað sama heilt fram til leygardagin, og longu sunnudagin verður aftur regn. Tí verður hetta mest sannlíkt tann vátasti Roskilde Festivalurin nakrantíð. Hóast hetta eru ivaleyst omanfyri 50.000 fólk longu komin út á kampingøkið, har tey royna at stuttleika sær so væl, sum nú einaferð ber til í hesum veðrinum. Stóra tónleikaøkið letur upp hósdagin, og tá bjóðar festivalurin eina ta bestu tónleikaskránna nakrantíð.

Teir fyrstu dagarnir eru mest av øllum eitt ball, har einans tann eini pallurin er opin. Pavillion Junior er ein pallur, har sonevnd upcoming nøvn royna seg. Í gjár vóru seks tílík nøvn á skránni, og heiðurin at lata pallin aftur átti Høgni Lisberg.

### Kroka til Høgna

Pavillion Junior er eitt av teimum fáu plássunum á festivaløkinum, sum í løtuni er undir taki. Har kanst tú turrskøddur standa og lýða á nøkur av teimum mest spennandi nýggju nøvnunum á tónleikapallinum í løtuni. Um tað var tankin, um at standa turrur eina løtu, ella tónleikurin hjá Høgna, sum dróg tey nøkur túsund fólkini, ið vóru komin saman í Pavillion Junior, tað kunnu vit bert gita um, men Høgni fekk væl fatur í teimum, og í onkrum løgum sungu heilt nógv við.

### Svingaði væl

Tónleikurin hjá Høgna hevur verið spældur rættiliga fitt í donskum útvarpi, og serliga lagið Just Dig hevur verið nógv at hoyrt, men, at tað var so væl dámt, kom eitt sindur óvart á meg. Fólk veruliga svingaði og sang við, tá Høgni og bólkurin spældu hetta festliga kontrikenda lagið. Hetta var kanska tann løtann, har Høgni hevði allar best fatur í áskoðarunum. Hetta hóast tað bert var næsta lagið á skránni. Tá frásøgumaðurin beyð Høgna vælkomnan á pallin, var teltið rættiliga fult av fólki, hóast tey ikki noyddust at trokast

Frásøgumaðurin spurdi um nakrir føroyingar vóru til staðar, og hóast nakrar hendur fóru upp í loft, so var stuttligt at síggja, at Høgni hevði savnað nógvar ferðir fleiri danir og útlendingar til konsertina enn føroyingar.

### Ov spakuligt

Teir løgdu fyri við einum nýggjum lagið, ið væntandi verður á komandi fløguni hjá Høgna. Side Of The Road er arbeiðsheitið á tí. Hetta er eitt rættiliga blueskent lag, rættiliga standard. Tað var væl spælt, og Høgni sang tað somuleiðis væl, men á onkran hátt var tað eisini rættiliga keðiligt. Fyrsta inntrykkið er, at hetta mundi vera eitt tað keðiligasta lagið, ið Høgni hevur skrivað higartil. Fólk vóru tó rættiliga væl við. Konsertin var tó eitt sindur órógva, av fullum fólki, ið tosaði so hart. Tíanverri hevur Roskilde Festivalurin sett eitt rættiliga lágt hægsta mark fyri, hvussu hart tónleikurin kundi vera skrúvaður frá, og tí var tað rættiliga forstýrandi, at fólk aftarlaga tosaði so hart í løgunum. Ljóðmaðurin hjá Høgna, Baldur gjørdi annars eitt gott arbeiði og fekk bólkin at ljóða sera væl.

Eg mátti leita mær longur fram, og har varð konsertin ikki í sama mun ávirkað av lágu voluminum. Men í friðarligaru løgunum, kanska serliga í lagnum Morning Dew var larmurin beinleiðis oyðileggjandi fyri upplivingina.

### Hava funnið hvør annan

Millum hæddarpunktini vóru Prince kenda lagið Been Out Of Town, og Leila, í løtum var Leila í heimsflokki, og fólki var ótrúliga væl við. Eisini lagið Desert, har allur bólkurin stendur fremst á pallinum og spælir og syngir við riggaði væl. Høgni hevur nú havt somu manning, ið nøkur ár, og tað tykist, sum teir veruliga hava funnið hvør annan. Hetta gevur teimum eisini yvirskot, ið hoyrist aftur í tónleikinum. Tað er stuttligt at síggja stóru spæligleðina hjá Alani Tausen og Jens L. Thomsen, hetta smittar, og øll gerast í góðum lag av tí.

### Lógvabrestirnir

Sum heild spældi bólkurn væl, og Høgni sang somuleiðis væl, onkra løtuna var hann tó dekan ov nasalur. Flest øll løgini riggaðu, tó var Morning Dew, sum áðurnevnt oyðilagdur av larmi, men eisini Learn To Ride On Waves havi eg hoyrt munandi betur. Men fólk var væl við, og lagið er so fantastiska gott, at tað ongantíð verður heilt galið. Hetta var síðsta lag á skránni hjá Høgna, og lógvabrestirnir og rópini vóru øgilig. Høgni og bólkurin noyddust út aftur at spæla eykaløg. Her fall valið á Bob Dylan klassikaran All Along The Watchtower, ið Høgni eisini spælir á fløguni Morning Dew. Tað er djarvt at spæla Dylan á hesum festivalinum, har amerikanska legendan ferð eftir ferð hevur vitjað. Men hetta komu teir álíkavæl væl frá, og kundu enda konsertina við lagnum Rise & Shine, ið á onkran hátta riggaði væl sum endi.

**Høgni spældi:**
*Side Of The Road*
*Just Dig*
*Been Out Of Town*
*Stargazers*
*Morning Dew*
*Desert*
*Leila*
*Learn To Ride On Waves*

**Eykaløg:**
*All Along The Watchtower*
*Rise & Shine*